DAGSINS MEINING

Samanlegging - fyrimunir og vansar

Spurningurin um at leggja allar kommunurnar í Suðuroy saman í eina kommunu er nú aftur komin upp at venda. Ikki so at skilja, at her er talan um ítøkiliga ætlan, men meira um ein spurning til umhugsingar. Beinleiðis orsøkin er, at bygdaráðsformaðurin í Sumbiar kommunu í útvarpssamrøðu sunnudagin mælti ti, at øll Suðuroyggin verður løgd saman í eina kommunu.

Bygdaráðsformaðurin hevur mælt til, at leggja saman við Tvøroyri sum eina byrjan. Her hava tey kanning, ið vísir, at áhugin fyri at leggja alla ovnna saman er stórur. Tað er lítið at ivast í, at fyrimunirnar við samanlegging eru størri enn vansarnir. Hinvegin eigur ein ikki at lata eyguni aftur fyri vansunum. Tað er tó mest, ið talar fyri samanlegging, væl at merkja, um fortreytirnar eru til staðar. Meginfortreytin er, at farið verður alt fyri eitt undir at gera tunnilin millum Hovs og Øravík. Hesin tunnil skuldi langt síðan verið gjørdur. Verður ikki farið undir hesa verkætlan her og nú, kunnu vit gloyma alt um samanlegging av kommunum í Suðuroy!

Tá tunnilini millum Hovs og Øravík er liðugur, verður Suðuroyggin sum ein býur. Tá henda verkætlan er framd, verður torført at finna argument ímóti ovnni sum eina kommunu. Tá oyggin er ein kommuna, fer tað at vera nógv høgligari at veita borgarunum tær tænastur, ið ein kommuna eigur at veita. Tá oyggin er vorðin ein kommuna, heldur alt stríð um, hvar tingini skulu vera uppat, og orðaskiftið fer tá at snúgva seg um, hvat ið skal vera. Hvussu fáa vit almenna arbeiðspláss til ovnna? Hvussu fáa vit gongd á undirsjóartunnilin umvegis Sandoynna? Hvussu fáa vit vinnulívið at blóma? Hvussu samskipar ein best skúla-, heilsu-, og almennaverk í ovnni?

Við samanlegging kann oyggin standa sum ein maður og tala við einari rødd. Hetta er tað einasta mál, sum sentralu myndugleikarnir í høvuðsstaðnum skilja. Fyrr enn suðuroyingar skilja hetta og taka avleiðingarnar av hesum beiska veruleika, kemur eingin vend í skeivu gongdina í ovnni. Tað er hesin veruleiki, ið liggur aftanfyri boðskapin hjá bygdaráðsformanninum í landsins sygstu kommunu. Løgið skuldi verið, um ikki dastið av suðuroyingum innast inni eru samdir við honum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Latið fiskimenninar fáa frið

Egil Olsen
fiskivinnufrøðingur

Við jøvnum millumbilum verður sjómannaskatturin havdur á lofti. Tað kan sýnast sum at alsamt fleiri eru fyri at avtaka sjómannaskattin við tí grundgeving, at hetta skal vera ein ósolidarisk skipan.

Sámal Jacobsen yngri hevði eina grein í bløðunum í síðstu viku, har hann við sakligum grundgevingum undirbygdi tað skilagóða í at varðveita sjómannaskattin. Eg vil mæla øllum teimum, sum hava ilt av sjómannaskattinum, um at lesa hesa greinina. Tað kann t. d. tykjast, sum fólk halda at sjómenn fáa ein skattalætta sum er 15%, men hesin er í veruleikanum 7-8%. Hetta merkir ein skattalætta, sum fyri allar flestu fiskimanna-inntøkurnar er millum 15 og 20.000 kr. Eg eri púra samdur við Sámali, at tey sum øvunda fiskimonnunum hendan skattalættan eru ráðini; keypið tykkum oljuklæði og gummi-styvlar og farið til skips.

Eg skal ikki taka øll sjónarmiðini uppaftur, sum Sámal førdi fram. Tó fari eg at minna á, at føroyska samfelagið er eitt fiskivinnusamfelag, har 96% av útflutninginum stava frá fiski og alivinnuni. Tað merkir, at av hvørjum hundraðkrónuseðli, sum kemur inn í landið, stava sekshálvfems krónur frá tí útflutningi, sum fiski- og alivinnan skapa.

Ynskir ein at varðveita tað føroyska vælferðarsamfelagið er neyðugt, at onkur tímir at stríðast á Mykinesgrunninum við skroddum troli, undir Eysturgrønlandi á rækjuskipi í kavaódn og á Føroya Banka á línuskipi við agnaskræpu á hondini. Hesi vátu, skitnu, buldrandi og rullandi arbeiðspláss er sanniliga verd tann lítla skattalætta sum hesir fiskimenn fáa.

Tann dagur tá ið okkara sjómenn ikki síggja, at tað er vert at stríðast longur, verður tað eitt fátækt Føroyar, har samfelagstrupulleikarnir vera risastórir. Latið fiskimenninar fáa frið og virðið heldur tað arbeiði, sum hesir røsku sjómenn gera til gagns fyri alt Føroya fólk.

Nógvar aðrar stórar átroðkandi uppgávur liggja fyri framman, sum eru týdningarmiklari at umrøða og viðgera, og sum krevja loysnir. T. d. hvussu fáa vit ein almennan sektor, sum tann privati sektorurin klárar at bera, tað høga kostnaðarstøðið í samfelagnum, kappingarførið í flakavinnuni, bert fyri at nevna nakrar fáar átroðkandi uppgávur, sum krevja loysnir.

Listsnobbarí valdast

Eyðun á Lakjuni

Eg minnist, tá ið vit vóru yngri, - plagdu vit viðhvørt at sita saman og lurta eftir klassiskum tónleiki, - og so skemtaðu vit okkum eisini onkuntíð við »at spæla kontrapunkt« (tit minnast norðurlendsku spurnarkappingina um tónleik í sjónvarpinum). Hetta kundi vera sera trupult, - t. d. at hoyra, um orkesturmusikkurin var skrivaður av Händel ella Bach, ella um nú Schumann ella Mendelsohn høvdu skrivað lítla klaverstykkið, vit lurtaðu eftir.

Hetta rann fram fyri meg, nú eg las greinina »Íblástur valdast« hjá Kinnu Poulsen í vikuskiftissosialinum 4. september.

Eftir at hava lisið greinina, fann eg út av, at eisini eg var so heppin at hava hitt umtaladu donsku pelskloddu konuna í greinini. Hetta var til eina konsert í Havn einaferð í 90'unum. Hon situr beint aftan fyri meg. Tað er nakað trongliget inni, og tætt er millum stólarnar. Vit hoyra eina strúkikvartett av Mozart. Eg siti og njóti tónleikin. Eg veit, at Mozart var ein meistari á hesum økinum. Eg havi jú skil fyri hesum. - Men við eitt verði eg óróg vaður, hoyri okkurt tesk aftanfyri. Pelsklædda danska konan er jú ikki einsamøll, hon er sjálv triðja, og eg hoyri hana siga: »Ja, det ER jo Haydn, - et vidunderligt værk. Der er jo så typisk Haydnsk med alle disse lette skalaløb…..« Eg hoyri ikki alt, men til seinast mannar hon seg rættuliga upp og sigur: »Det er jo kun Haydn, der kan få de toner frem på den måde, ikke sandt?«

Eftir konsertina kann eg ikki bara mær, men fari stillisliga yvir til konuna og sigi henni, at tað er also Mozart, ið hevur skrivað tónleikin, og ikki Haydn. Konan er bæði forharmað og fornermað um, at hon kundi taka so dyggiliga feil. Eg royni at trávissa hana um listarliga gløggskygni og líkheitina millum Haydn og Mozart, - um at Haydn er faðirin at strúkikvartettini, og sigi henni, at Mozart var yngri og sikkurt bygdi á herðarnar á Haydn, men lítið batti. Hetta gerst pelskloddu donsku konuni ov mikið, og hon fer.

Nú kanst tú kanska spyrja,

Framhald á síðu 11

Innsent tilfar
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða ráðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn

E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Lógloysið í býráðnum heldur fram

Leivur Hansen,
býráðslimur

Hóast dyggiliga settur upp á pláss av Innlendismálaráðnum fyrr í ár í sambandi við kæru frá minnilutanum um ymisk brot á kommunustýrislógina, heldur Jan Christiansen kortini fram við at venda og snara lógum og reglum sum best ber til í yrki sínum sum borgarstjóri.

Hetta kom enn eina ferð til sjóndar á almenna býráðsfundinum hóskvøldið.

Tá komið var til mál nr. 5 á skránni, Yvirtøka av Heygsgerði, bað Høgni Mikkelsen um loyvi at fara av fundinum, meðan hetta málið varð viðgjørt, tí hann metti seg vera ógegnigan í hesum máli.

Málið snúði seg um umsókn frá sp/f Høgna Mikkelsen um at lata kommununa yvirtaka ein vegastubba á Heygsgerði, sum felagið nýtti í sambandi við randarhúsbygging har úti fyri nøkrum árum síðani, og sum nú leyk treytirnar hjá kommununi fyri at verða yvirtikin.

Sambært grein 10 í kommunustýrislógini hevur kommunustýrislimur skyldu at boða frá, um hann heldur iva vera um sítt gegni, men kommunustýrið (býráðið) ger av, um hann er ógegnigur.

Borgarstjórin játtaði tó Høgna at fara av fundinum, uttan at býráðið sum fyriskrivað slapp at taka støðu til málið.

Tá undirritaði gjørdi borgarstjóran varugan við, at her var ikki rætt farið fram, kveistraði hann hetta bara til viks!

Tá undirritaði síðani bað um at fáa felt niður í gerðabókina, at hann mótmælti framferðarháttinum hjá borgarstjóranum, sýtti hann rætt og slætt fyri hesum!

Sostatt framdi hann bara hesa lítlu løtuna tvey álvarsom brot á kommunustýrislógina og stýrisskipanina hjá kommununi.

Sambært grein 25 í lógini kann kommunustýrislimur, sum hevur eina øðrvísa fatan av einum máli, krevja at fáa serstøðu sína í stuttum viðmerkta í gerðabókina. Hvørki borgarstjóri ella kommunustýrið kunnu sýta honum hetta!

Men tað rørir altso ikki Jan Christiansen og likasælu samgongufelagar hansara. Teir smíða sínar egnu lógir og reglur.

Hetta er eisini beinleiðis orsøkin til tær mongu gølur og ósemjur, ið tíverri - í alt ov stóran mun - hava eyðkent hesa býráðssetuna.

Her má og skal vend koma í, og vónandi hava veljararnir hetta í geyma tann 9. november.

Annars er um mál nr. 5 á síðsta býráðsfundi at siga, at býráðið samtykti uttan atkvøðugreiðslu at yvirtaka vegin hjá Høgna á Heygsgerði.

Tyrvingarpláss aftur í nevnd

Ætlanin at gera nýtt tyrvingarpláss í grótbrotinum á Glyvursnesi ístaðin fyri gamla tyrvingarplássið í Húsahaga, endaði aftur í heilsu- og umhvørvisnevndini.

Býráðið samtykti við 9 atkvøðum fyri og 1 ímóti at beina málið aftur í nevnd, uttan at málið yvirhøvur hevði fingið nakra sum helst viðgerð.

Minnilutaumboðið í heilsu- og umhvørvisnevndini, Hildur Eyðunsdóttir, hevði biðið um at fáa málið fyri býráðið, men hesum forðaði ein onnur kvinna í nevndini fyri, tá hon sum fyrsti roðari á býráðsfundinum fekk orðið.

Beate L. Samuelsen, ið annars sum einasti samgongulimur í heilsu- og umhvørvisnevndini hevur verið ímóti hesi ætlanini, gjørdi ikki mætari enn at krevja málið aftur í nevnd.

Í slíkum førum siga reglurnar, at orðaskiftið skal steðga alt fyri eitt, so býráðið kann taka støðu til uppskotið.

Og við 9 atkvøðum fyri og 1 ímóti varð samtykt at beina málið aftur í nevnd.

Undirritaði atkvøddi ímóti uppskotinum sum mótmæli ímóti, at býráðslimir ikki fingu høvi at viðgera hetta mál, nú tað loksins var komið á býráðsborð.

Málið fór aftur í nevnd við kravi um, at álagt verður umsitingini at finna annað hóskandi øki at gera eitt nýtt tyrvingarpláss, so grótbrotið á Glyvursnesi kann verða brúkt til okkurt annað skilabetri endamál.

Eftir hvat skilst á býráðslimum úr báðum legum, hevði ætlanin hjá meirilutanum í heilsu- og umhvørvisnevndini neyvan vunnið frama, var hon komin til atkvøðugreiðslu hóskvøldið.

Ósemja seinkar skúlabygging

Vandi er fyri, at nýggi skúlin í Hoyvíkshaganum verður upp aftur meira seinkaður og dýrari enn higartil roknað við.

Herfyri kom undan kavi, at byggiætlanin er minst eitt ár afturút, og at teir yngstu flokkarnir sostatt ikki sleppa í skúla fyrrenn í fyrsta lagi eftir summarfrítíðina í 2006.

Men nú ber ósemja í býráðsmeirilutanum eftir øllum at døma í sær, at henda risastóra verkætlanin kemur upp aftur meira í drag.

Á býráðsfundinum hóskvøldið kom knappliga fram, at Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen - uttanum hini í samgonguni! - nú vilja hava tann ætlaða tvísporaða barna- og framhaldsskúlan til eisini at fevna um 10. flokk.

Hetta kom sum snarljós úr klárum himli á formannin í mentamálanevndini, Heðin Mortensen, sum í stundini kravdi málið aftur í nevnd. Hetta varð samtykt við 6 atkvøðum fyri og 2 ímóti.

Undirritaði atkvøddi ímóti at beina málið aftur í nevnd við teirri grundgeving, at nú er nógmikið dráað í hesum máli.

Tørvurin á einum nýggjum skúla í Hoyvíkshaganum økist dag frá degi, og tí er neyðugt at fara undir hesa bygging sum skjótast.

Endar nýggja viðgerðin í mentamálanevndini við, at skúlin nú eisini skal lagast til 10. flokk, so fer hetta uttan iva at seinka øllum arbeiðnum í fleiri mánaðir aftrat - umframt at talan verður um eina munandi dýrking.

Hetta kann meira enn so fáa fylgjur fyri aðrar neyðugar útbyggingar á skúlaøkinum - eins og á øðrum økjum.

Og tað vil eg ikki vera við til.

Framhald av síðu 10

um kvartettin bleiv verri av vitanini um, hvør hevði komponerað hana? Ella - tá ið tú stendur og ert bergtikin av eini mynd hjá Zachariasi Heinesen og fært at vita, at Øssur Mohr hevur málað hana - um myndin tá verður verri. Nei, tað er tvætl, ella onkur vildi sagt: »tað reina snobbarí«. Ja, tað skal bara valdast.

Men aftur til greinina »Íblástur valdast«. Hví Kinna Poulsen í fleiri ummælum júst dregur viðurkenda listamálara okkara Øssur Mohr fram og viðger hansara málingalist á ein negativan hátt og ákærir hann fyri at vera plagiierandi, er fyri mær ein gáta, tí tær nýtist ikki at vera serfroðingur á økinum (um nakað eitur so) fyri at síggja, at flest allir okkara ungu listamenn byggja á herðarnar og fáa íblástur frá teimum eldru. Eg kundi nevnt so nógvar, sum hava hingið í listaskálanum imillum ár og dag. Hetta er jo púra natúrligt.

Øssur, hóast ikki blaðungur, er jú ungur listamálari, sum hevur havt serligt hegni at mála og vísa sína list fram bæði her heima, men ikki minst í útlondum, og kanska er tað júst hetta, ið kemur illa við hjá onkrum. Spennandi verður kortini at fylgja honum í komandi árum. Spennandi at síggja, hvussu hansara motiv, »bygdin við havið«, víðari fer at broytast og mennast, og hvussu hann fer at taka onnur enn økend element inn í myndina.

Kanska eins og Beethoven. - Lurta vit eftir einum av hansara seinastu stúkikvartettum, t. d. op. 131, komponerað seint í 1825, hoyra vit eitt tónleikamál, ið heilt og fult er broytt í mun til kamartónleikin hjá tí unga Beethoven frá uml. aldarskiftinum, sum tá í nógv størri mun er bygdur á herðarnar á teimum, sum fóru undan.

Til seinast vil eg siga, at tað er gott, at vit hava listakennarar sum Kinnu Poulsen o.o., ið kunnu siga okkum, nær støðið er høgt, og nær tað er lágt, - sum kunnu fortelja teimum røttu persónunum, ið hava ávirkan, »hvat fólkið SKAL hava« - soleiðis, at vit, ið lítið skil hava á hesum, ikki verða villleidd í okkara ansi fyri list. Hugsið tykkum, um ein listamálari sleppur inn í listaskálan, okkara tjóðlistasavn - uttan at vera inni í hitanum hjá ovastu mentanarelituni í Havn!

At ein málari sum Øssur Mohr so hevur fingið sera stóra viðurkenning av fólkinum - bæði í Føroyum og í útlondum, er sakini púra óviðkomandi.

Takksom viðmerking til Winthereigs!

Virgar T. Dalsgaard

Fleiri holl fólk hava telefoniskt gjørt meg varan við, at eg í grein míni »Sjónvarpsins sjakalar« mikudagin tíanverri havi gjørt *eina formella villu* við faktuelt skeivum upplýsingum um sjónvarpið og Grækaris Magnussen, og sjálvandi biði eg mirðiliga um fyrigeving fyri tað, men tíbetur skeiklar henda villa avgjørt einki principielt í restini av greinini - *kvintessensurin* í henni stendur framvegis óskalaður! Men eg noyðist nú bara leggja afturat, at *eisini* útvarpið fór niður í sama køstin, sum Grækaris hevði skumpað í fleiri mánaðir frammanundan - *bara ikki akkurát henda eina dagin* á flogvøllinum!

Sama dagin eg var farin at skriva hesa lítlu umbering, frætti eg, at harra Øssur Winthereig í lítlum greinastubba hevur verið so beinasamur at gjørt vart við mína villu í bløðunum. Tað er altið stimbrandi við alvaknum journalistiskum eygleiðarum, og er tað nakað, sum eg leggi dent á, so er tað, at keldur mínar skulu vera í lagi, og at faktuellir upplýsingar eru álítandi! Tí takki eg harra Øssuri so flittuliga fyri rættleiðingina!

Hví kemur slík villa í? Ja, fyri eina ferðs skyld er misskiljing komin í millum meg og mínar annars sera álítandi tíðindakeldur í Føroyum, soleiðis at tað lítla *pronomen »teir«* hevur fingið fatalar avleiðingar. Eg hoyrdi nevniliga frá míni keldu, at *nú hava »teir« elt drongin heilt vestur á flogvøllin og heilt framat flogfarinum!* Hesir *»teir«* vóru útvarpsmenn - eg metti skeivt, og helt hesar »teir« vera sjónvarpsmenn. Abyrgdin er mín, og eg kann sjálvandi ikki lasta kelduna - tí eg átti at havt eftirkannað málið betri. Enn einaferð veiti eg tí sjónvarpi og Grækarissi treytaleysa umbering *fyri hesa einstøku episodu* vesturi í Vágum! Einki annað í greinini verður tikið aftur - tvørturímóti!

Lat meg enda við at nema við fyrsta partin av stubbanum hjá Winthereig, har hann roynir seg sum stilistur og filosoferar eitt sindur um míni orð og mítt mál! T. d. veit hann at siga, at orð míni eru sett saman, soleiðis at tey eru *lesilig* fyri Winthereig (hann nevnir tey »lesbar«) - hetta eri eg stakfegin um, tí tað mótprógvar fullkomuliga tí, sum so ofta verður tikið til í dag, at flestu nútímans journalistar nærmast skulu vera *funktionellir analfabetar*!

Endiliga konstaterar Øssur, at eg brúki nógv *sjáldsom* orð. Sjáldsom fyri hvønn og hvørjar? -

Her veldst nógv um orðameingið hjá monnum, og hvør ið lesarin er - tí alt er jú relativt, men fyri tey fólk, sum hava eitt rímuligt minimum av kunnleika, almennari vitan og intellektuellum horisonti eru míni orð als ikki serliga sjáldsom, og tað áttu tey avgjørt ikki at verið fyri nakran debattør ella journalist - heldur áttu tey at verið eitt skyldugt og neyðugt arsenal av tí intellektuella skynsemisførningi, sum stórskaldið Goethe mælti europeiskum skúlamonnum og intellektuellum til at veita flest møguligum av teimum ungu í tá uppvaksandi ættarliðinum! Hann kallaði idealið fyri *alment klassiskt dannilsi*! Hesum ideella kravi og hesi mætu stremban áttu okkara journalistar eisini at arbeitt fram ímóti - heldur enn at virka fyri meira *fordummilsi*!

Tað kann væl vera, at orðatilfarið hjá einum miðal mikrofonmanni í dag er so mikið avmarkað ella tódnað, at tað knípir at lesa eina tekst, har fleiri fremmandorð eru komin uppí. Um so er, er hetta sjálvsagt ein málsligur sorgarleikur. Hvørva kontinentalar nuancur og synonymir, verður okkara fremsta intellektuella amboð, - *málið* púra steindeytt! Hesum eru Øssur og aðrir yngri mikrofondreingir sjálvir rættiliga ósekir í - tað eru haraftrímóti teir ráðaríku *puristarnir*, sum hava skyldina av, at so nógv altjóða orðatilfar er lúkað burtur úr okkara máli, - soleiðis at tað bæði er blivið stirvið, klombrut og gelt fyri stíl! Hetta er við til intellektuelt at fjøtra og múlabinda, ikki bara journalistar, men alt tað uppvaksandi ættarliðið og gera tey til bornertar heimføðingar við krympaðum sjónarringi og ófantaligum ónuanceraðum orðatilfari. Alvaratos, áttu

Framhald á síðu 33